gult6 cyan6 magenta6 svart6





*Ein nýggj byrjan. Leif Berg frá Berg-Hestum og Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum, seta seg fyri fyrstu ferð niður at tosa um trupulleikarnar, Berg-Hestar hava av hagagøtunum, ið liggja í órøkt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Leif og Heri góðar vónir

**Glið er nú komið á samskiftið millum Leif Berg og Ferðaráðið. Mánamorgunin varð Leif Berg boðin á gátt at tosa um, hvussu teir í felag kunnu loysa trupulleikarnar við vánaligu hagagøtunum, sum eru fortreytirnar undir virksemi Leifs, Berg-Hestum**

FERÐAVINNA
*Turið Kjølbro*

Gjáramorgunin varð borðreitt við kaffi, nýbakaðum rundstykkjum og wienerbreyði við tjúkkum glaringi í fundarhølunum hjá Ferðaráð Føroya í Vágsbotni í Havn. Stjórin á Ferðaráðnum, Heri Niclasen, hevði boðið Leif Berg frá Berg-Hestum á gátt at tosa um, hvussu málið við vánaligu hagagøtunum verður loyst og hvussu eitt betri samskifti verður ímillum Ferðaráðið og Leif Berg í framtíðini. Undan fundinum høvdu báðir partar góðar vónir.

– Tað er bara gott, at vit nú seta okkum niður at tosa um trupulleikarnar, vit dragast við í Berg-Hestum, eitt nú við gøtunum, sum eru fortreytin undir okkar virksemi. Eg rokni við, at Ferðaráðið og Heri Niclasen kunnu virka við til, at málið verður loyst, sigur Leif Berg.

Og stjórin á Ferðaráðnum tekur undir við Leif Berg.

– Tað sum Leif Berg hevur ført fram í Sosialinum í farnu viku hevur í øllum førum gjørt, at eg eri komin upp úr stólinum. Eg visti ikki, at Leif hevði so stórar trupulleikar av gøtunum, og eg eri harmur um, at eg ikki havi havt møguleika fyri at hjálpa honum síðani eg kom á Ferðaráðið. Nú fara vit báðir at tosa nærri um, hvat gerast kann og skal, og hvat vit í felag kunnu gera fyri at koma yvir forðingarnar, sum eru. Okkara partur skal ikki liggja eftir, sigur Heri Niclasen.

### Fortreytirnar ikki tilstaðar

Í samrøðu í Sosialinum í farnu viku eftirlýsti Leif Berg eitt betri samskifti og størri áhuga frá Ferðaráðnum fyri tí, ið fer fram í vinnuni.

– Tey, ið starvast í ferðavinnuni, mugu við bit og slit stríðast fyri at skapa karmar sjálvi uttan vælvild frá almennum myndugleikum. Fortreytirnar fyri góðari og gevandi ferðavinnu eru ikki til staðar í nógvum førum, segði Leif Berg, sum í fleiri ár til fánýtis hevur kært sína neyð á Ferðaráðnum og fyri fleiri landsstýrismonnum fleiri ferðir – uttan at koma eitt vet longur.

Atfinningarnar komu sum snarljós á klárum himni fyri stjóran á Ferðaráðnum, sum ikki kendi seg aftur í teimum.

– Eg skilji væl, at Leif Berg er ørkymlaður av hesum viðurskiftum. Men Ferðaráðið hevur als ongan áhuga í at avbyrgja seg frá ferðavinnuni. Tvørturímóti. Vit hava dagligt samskifti við fólk í vinnuni og tað er ikki mín varugi, at tey kenna seg við sviðusoð av Ferðaráðnum. Dyrnar á Ferðaráðnum standa altíð opnar fyri fólki, sum hava eitthvørt uppá hjarta, vit kunnu hjálpa við. Ein av uppgávunum hjá Ferðaráðnum er at leggja trýst á røttu myndugleikar, og eg kann lova Leif Berg, at vit fara at gera alt vit kunnu, segði Heri Niclasen í viðmerking til samrøðuna við Leif Berg í farnu viku.

Útlit eru sostatt fyri einum betri samskifti millum partarnar og at glið er komið á málið um hagagøturnar, ið liggja í órøkt.

# Kommunurnar eiga gøturnar

**– Sambært lóg eiga kommunurnar uppgávuna at væla um gomlu gøturnar. Tað er sera óheppið, at nógvar liggja í órøkt, men landið kann ikki fara inn á øki, sum eru kommunal, tí tað skapar fyridømi fyri øðrum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í ferðavinnumálum**

FERÐAVINNA
*Turið Kjølbro*

Ferðavinna er so nógv, og hóast ferðavinna sum vinna hoyrir undir Vinnumálastýrið, fer hon eisini inn á onnur málsøki. Hetta kemur til sjóndar eitt nú, tá ið vit spyrja landsstýrismannin í ferðavinnumálum, Bjarna Djurholm, hvør eigur ábyrgdina og harvið uppgávuna at væla um gomlu haga- og bygdagøturnar í hagunum í Føroyum. Hesar gøturnar eru fortreytin undir ríðingini hjá Berg-Hestum, men tær eru í so ringum standi, at bæði ross og fólk kunnu koma í vanda. Leif Berg, sum eigur og rekur Berg-Hestar, hevur í fleiri ár roynt at fingið greiði á, hvør eigur uppgávuna at væla um gøturnar, hann hevur eisini kunnað fleiri landsstýrismenn um trupulleikan. Men enn er málið ikki loyst.

– Uppgávan hjá Ferðaráðnum er at arbeiða við málum, sum ferðavinnan kemur við og tað er upp til teirra at heita á røttu myndugleikar og onnur um at loysa trupulleikar. Ferðaráðið hevur ikki myndugleika at áleggja nøkrum nakað, tey kunnu bara vísa á trupulleikar, sigur Bjarni Djurholm.

Sum landsstýrismaður í vinnumálum hevur Bjarni Djurholm eisini um hendi landsjørðina og tað er Jarðarráðið sum umsitur hana. Men varða- og bygdagøturar ganga ígjøgnum privatajørð, kommunalajørð og festijørð, og tað ger málið við gøtunum ikki einfaldari. Sambært grein 47 í Hagalógini er tað landsstýrið sum ásetur nærri reglur viðvíkjandi gøtunum. Ein løgtingssamtykt frá 1940 sigur, at tað er skyldan hjá kommununum at halda varðagøturnar og sýslumenninir hava eftirlitið hesum viðvíkjandi.

– Skipanin er als ikki nóg góð ella greið, og hetta er bert eitt dømi av mongum um, hvussu ógreitt býtið millum land og kommunu er. Úrslitið av at gøtur ganga um privata-, kommunala- og festijørð er, at nógvar liggja í órøkt, og tað er avgjørt óheppið. At reglurnar eru so ógreiðar er í sjálvum sær ein stórur trupulleiki hóast útgangsstøðið sambært lóg er, at uppgávan er kommunal. Og landið kann ikki fara inn á øki, sum eru kommunal, tí tað skapar fyridømi fyri øðrum, sigur Bjarni Djurholm.

### Óbeinleiðis stuðul

Í samrøðu við Leif Berg í seinastu viku vísti hann á hepnu avleiðingarnar av, at ferðavinnan fær ígongdsetarastuðul. Óteljandi dømi eru um góð hugskot, sum ikki verða framd í verki ella sum eftir stuttari tíð detta fyri bakka, tí eingir pengar eru til fyri at fáa veruliga gongd á.

– Eg eri púra samdur í, at íløgur í ferðavinnuna og íløgur, sum skapa fortreytir, geva seg fleiri ferðir aftur, men vit meta ikki, at tað er rætt at veita stuðul til rakstur, íløgur, lán ella veðhald. Men tað er ikki óhugsandi at stuðul til nýggj tiltøk innan vinnuna kann verða veittur við ráðgeving og sum menningarætlan. Talan verður ikki um at veita pengar sum beinleiðis stuðul til eina ætlan, men ferðavinnan fer at njóta væl av nýggja Vinnuframagrunninum. Ígjøgnum hann hevur ferðavinnan góðan møguleika at søkja um stuðul til verkætlanir, ráðgeving, menningarátøk, sølufremjandi tiltøk og annað, sigur Bjarni Djurholm.

Í ferðavinnuni hava fólk í fleiri ár sett spurnartekin við, um játtanin til Ferðaráðið verður brúkt rætt. Men landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum metir seg ikki hava nakra orsøk til at halda, at stovnurin ikki brúkar peningin skilagott.

– Stýrið fyri Ferðaráðið hevur ábyrgdina av, at peningurin verður rætt brúktur og einki sigur mær, at tað ikki er nóg gott arbeiði, sum verður gjørt á Ferðaráðnum.

Ein nevnd mannað av umboðum úr ferðavinnuni og Ferðaráðnum hava arbeitt við uppskoti um ferðavinnupolitikk. Álitið, sum er komið burtur úr hesum arbeiðnum, er nú sent til hoyringar saman við lóg um uppskot til lóg um Ferðaráð Føroya. Afturmeldingarnar skulu vera aftur í Vinnumálastýrinum fyrst í komandi mánaði.

– Uppgávurnar hjá Ferðaráðnum eru sambært nýggja uppskotinum greiðari og einfaldari. Lógin og ferðavinnupolitikkurin fara ikki at loysa allar trupulleikar, men í lógini verða nýggir karmar fyri ferðavinnuni og tað í sjálvum sær er gott. Sambært hesi lóg kann landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum fara inn á øki, ið eru viðkomandi fyri ferðavinnuna at fáa greitt. Eg kann ikki svara fyri sum er, um trupulleikin við gøtunum verður loystur, men tá verður í øllum førum greitt, hvørjir karmarnir eru, sigur landsstýrismaðurin.

Á ólavsøku leggur Bjarni Djurholm álitið fyri løgtingið til tingsins viðgerð, har aðalorðaskifti verður um ferðavinnupolitikk.



*– Eg eri púra samdur í, at íløgur í ferðavinnuna geva seg fleiri ferðir aftur, men vit meta ikki, at tað er rætt at veita stuðul til rakstur og íløgur, sigur Bjarni Djurholm*


Sig okkum frá



Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Sosialurin


gult7 cyan7 magenta7 svart7





Løgmaður umhugsar støðuna:

# Tórbjørn hongur í klønum tráð

**Landsstýrissessurin hjá Tórbjørn Jacobsen hongur enn einaferð í einum klønum tráð. Løgmaður umhugsar í løtuni, um óhøviski atburðurin í tinginum fríggjadagin skal fáa avleiðingar**

RUMBUL
*John Johannessen*

Atburðurin hjá Tórbjørn Jacobsen í tinginum fríggjadagin er eitt álvarsamt mál.

Hetta staðfestir løgmaður, sum í løtuni unhugsar, um framferðir hjá landsstýrismanninum skal fáa avleiðingar fyri landsstýrissessin.

Tórbjørn Jacobsen leyp framav undir triðju viðgerðini av uppskotinum um kringvarpslóg, sum hann sjálvur eigur. Tað, sum hendi var, at mentanarnevndin í áltini sínum til málið mælti til, at uppskotið varð tikið aftur. Støðuna hevði nevndin millum annað tikið út frá einum tilmæli frá Landsgrannskoðaranum.

Hetta toldi Tórbjørn Jacobsen ikki. Hann fór upp á tingsins røðarapall og kallaði álitið hjá mentanarnevndini fyri eina kókaða hønu og Landsgranskoðaran fyri »ein gemenan bókhaldara«, áðrenn hann tók uppskotið aftur.

### Arbeiddu við misáliti

Framferðin hjá Tórbjørn Jacobsen fekk øði í tingfólk. Hendrik Old úr Javnaðarflokkinum fór beinan vegin at arbeiða við at leggja fram misálit móti landsstýrismanninum.

Tingformaðurin hevði um hetta mundið slitið fundin, og skuldi Hendrik Old nýta steðgin áðrenn næsta tingfund til at orða misálitið. Men tingfundur varð settur aftur beinan vegin, og eydnaðist tað tí ikki at orða uppskotið.

Hevði misálitsuppskotið komið fyri tingið, var eingin ivi um, at landsstýrismaðurin hevði rokið. Andstøðan ætlaði sær at atkvøða fyri, øll sum hon var, eins og samgongulimir eisini ætlaðu sær at atkvøða fyri.

Í Tjóðveldisflokkinum vóru fólk í øðini inn á Tórbjørn Jacobsen, tí setningurin um kókaðu hønuna varð fataður sum persónligt álop á ein av tingmonnum floksins. Sosialurin skilur at talan er um Signar á Brúnni.

Tí ætlaðu bæði Finnbogi Ísakson, Signar á Brúnni og møguliga eisini Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum sær at atkvøða fyri einum misáliti. Í Fólkaflokkinumn vóru Rúna Sivertsen og Jógvan á Lakjuni fyri at leggja misálit á landsstýrismannin.

### Skal kannast

Løgmaður heldur tað vera sera álvarsamt, at landsstýrismaðurin bert varð bjargaður, tí menn ikki fingu stundir at skriva uppskotið um misálit.

Tí er løgmaður farin at kanna nærri, hvat hendi í tinginum fríggjadagin.

– Eg fari at hyggja upp á málið og meta um tað. Men eg skal ikki siga í dag, um maðurin fær sekkin, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, væntar at hava tikið støðu í málinum eina av fyrstu døgunum.

Í november í fjør mundi Tórbjørn Jacobsen eisini mist landsstýrissessin, tá hann kallaði løgmann ein danskan leigusvein, sum hevur fleiri lík í lastini.

# Tingfólk ov erkvisin

**– Fólk, sum bjóða seg til at standa í fremstu røð í politiska lívinum, mugu tola eitt sindur meiri av, heldur Torbjørn Jacobsen. Hann viðurkennir, at hansara málburður er merktur av mongu árunum til sjós**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Hann er skipari og hevur siglt meginpartin av lívi sínum. Hann er bersøgin og kontantur, og tað kemur við hvørt uppá tvørs í politiska heiminum.

Talan er sjálvandi um landsstýrismannin, Torbjørn Jacobsen, sum fríggjadagin fekk ilt í tingfólk, tá hann nýtti vendingar sum »kókaðar hønur« og »gemenur bókhaldari« í tinginum.

Hendan talan mundi enda við einum misálitisuppskoti á landsstýrismannin, sum sigur seg vera skakkur av hesum tíðindunum.

– Umborð á skipum verður sagt, sum tað er, og tann, sum ikki tolir tað, má fara í land. Tá eg havi eg siglt meginpartin av lívi mínum slepst ikki undan, at eg orði meg eitt sindur øðrvísi, enn tingfólk eru von við, sigur Torbjørn Jacobsen.

### Kókaðar hønur

Landsstýrismaðurin heldur, at fólk, sum bjóða seg fram at standa í fremstu røð í politiska heiminum, eiga at tola eitt sindur meiri av.

– Tingfólk eru ov erkvisin og áttu at tolt meiri av, sigur hann.

– At eg brúkti vendingina kókaðar hønur, var ikki ætlað nøkrum ávísum tingfólki, soleiðis sum onkur hevur viljað gjørt tað til. Tað komst meiri av, at hetta var sama dagin, sum bløðini skrivaðu um hønurnar á Velbastað, sum vórðu avtiknar.

Torbjørn Jacobsen sigur seg tí bara nýta ein samanbering, sum hann helt hóskaði til álitið, sum hann var sera misnøgdur við.

### Munur á fólki

Torbjørn Jacobsen hevur ongar ætlanir um at broyta sín serstaka málburð.

– Tað er helst munur á fólki, sum hava sitið í +27 hitastigum í eini stovu alt sítt lív, og fólki, sum hava siglt millum ísfjøll og staðið á brúgvarveinginum í –30 stigum part av lívinum, sigur hann.

– Tað verður bara tosað um, at eg skal broyta meg, men tað havi eg ikki hug til. Poltikkur er eitt dagligt stríð, og tí mugu politikarar eisini tola, at tað falla nøkur bersøgin orð við hvørt, heldur Torbjørn Jacobsen.



*– Tað verður bara tosað um, at eg skal broyta meg, men tað havi eg ikki hug til. Poltikkur er eitt dagligt stríð, og tí mugu politikarar eisini tola, at tað falla nøkur bersøgin orð við hvørt, heldur Torbjørn Jacobsen, landsstýrimaður*


Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg